Til Yvirfriðingarnevndina

**Viðvíkjandi henstilling um møguliga aðra staðseting av MTB-breyt í Flatnahaga**

Sersambandið fyri súkkling og triathlon ("SST") hevur móttikið skriv frá Yvirfriðingarnevndini, dagfest 16. juni 2026, har nevndin mælir til SST at kanna, um ætlaða MTB-breytin í Flatnahaga kann staðsetast við ella millum vindmyllurnar ístaðin fyri á umsøkta økinum við Fjallið og Vesturvarð.

Yvirfriðingarnevndin skrivar, at hon hevur skilt, at økið í Flatnahaga er líka væl egna til staðsetan av ætlaðu MTB-breytini. Tað stendur SST ógreitt hvussu nevndin hevur fingið hesa fatan ella hvat nevndin grundar hesa fatan á.

SST ynskir at gera greitt, at vit ikki meta, at grundarlagið fyri tilmælinum er nøktandi upplýst. Serliga halda vit, at tað byggir á eina skeiva ella í minsta lagi ófullfíggjaða fortreyt, tá ið tað verður lagt til grund, at økið við vindmyllurnar og umsøkta økið eru nøkunlunda javnt væl egnað til endamálið.

Staðsetingin, sum søkt er um, er ikki vald tilvildarliga. Hon er úrslit av einum longri forarbeiði, har Tórshavnar kommuna í fleiri umførum ( tvørs av fleiri samgognum) hevur peikað SST á hetta økið sum hóskandi til eina MTB-breyt, seinasta árið við einar tilgongd har aktørar í økinum eru boðin við á felagsfundir so politikarar hava hoyrt øll sjónarmið. Verkætlanin hevur eisini verið viðgjørd politiskt, og ein meiriluti hevur tikið undir við, at hetta er tann verkætlanin og tann leiðin, sum kommunan og umsiting ynskir at arbeiða víðari við.

Tað er tí ikki rætt at lýsa staðsetingina sum eina staðseting, ið SST fyrst og fremst hevur valt, tí hon er nærri býnum. At breytin liggur rímiliga atkomuliga frá býnum er ein fyrimunur, men tað er ikki høvuðsgrundgevingin. Høvuðsgrundgevingarnar eru ítróttarligar og tekniskar, har serlit at verða tikin til trygd, rakstrur og tíðarætlan.

Eftir okkara meting er økið við vindmyllurnar ikki líka væl egnað til eina MTB-breyt, sum skal nýtast til venjing, breiddarvirksemi og altjóða kapping í sambandi við Oyggjaleikir. Ein slík breyt krevur eina væl skipaða linjuføring, hóskandi hæddarmetrar, tekniskar partar, møguleika fyri tryggari atkomu, atlit til áskoðarar, bjargingarviðurskifti, rakstur og viðlíkahald. Um breytin skal flytast longur niðan í lendið, fer hetta eftir okkara meting at gera breytina verri egnaða til venjingar og kappingar, herundir Oyggjaleikir.

Harumframt er talan um eina ovurstóra tillaging av eini longu fyrireikaðari verkætlan. Ein flyting til økið við vindmyllurnar merkir, at verkætlanin skal byrja av nýggjum: nýggj staðseting, nýggj linjuføring, nýggj teknisk meting, nýggj kostnaðarmeting og væntandi eisini nýggjari loyvisviðgerð. Hetta hevur týðandi avleiðingar fyri bæði fígging og tíðarætlan.

SST hevur longu lagt munandi arbeiði í verandi ætlan, og við tí tíðarætlan, sum er galdandi fram móti Oyggjaleikum, er tað okkara greiða meting, at tað hvørki er realistiskt fíggjarliga ella tíðarætlanarliga at flyta breytina, um hon skal verða liðug og roynd áðrenn oyggjaleikir.

Vit vilja eisini vísa á, at økið kring verkætlanina longu í stóran mun er merkt av ymiskari nýtslu, herundir vegum, gøtum, vindmyllum og øðrum felagsnýtsluendamálum. Í tí høpinum tykist tað ósamsvarandi, um júst henda avmarkaða ítróttar- og fólkaheilsuverkætlanin verður tikin burturúr sum serliga trupul, uttan at ein ítøkilig og samanberandi grundgeving verður givin fyri, hví ávirkanin frá hesari verkætlanini verður mett at vera avgerandi øðrvísi enn onnur nýtsla í økinum.

SST hevur sjálvandi virðing fyri, at náttúru- og landslagsatlit skulu takast í álvara. Vit hava eisini lagt dent á, at breytin skal gerast so skynsamt og varisliga sum gjørligt, og at ávirkanin á lendið skal avmarkast. Serfrøðingar úr Kanada hava verið í Føroyum og merkt og tekna breytina, so hon hevur minst møguliga ávirkan á nátturina og linjur er langdar so minsta árini á nátturina er neyðugt. Hetta er nakað man er vanur við í arbeiðinum í Kanada tá teirra natura eisini er serliga viðkvom. Men vit meta ikki, at hetta endamálið verður best rokkið við at flyta verkætlanina til eitt øki, sum eftir okkara meting er verri egnað og sum kann føra við sær størri samlaða ávirkan, bæði praktiskt og ítróttarliga.

SST heitir tí á Yvirfriðingarnevndina um at taka endaliga og greiða støðu til málið á einum nøktandi grundarlagi.

Um Yvirfriðingarnevndin metir, at loyvið frá Náttúrufriðingarnevndini fyri Streymoyar sýslu ikki kann góðtakast, verður heitt á nevndina um at greiða ítøkiliga frá:

- hvørji lógaratlit gera, at loyvið ikki kann góðtakast,
- hvørji ítøkilig viðurskifti í umsøkta økinum verða mett at vera avgerandi,
- hví økið við vindmyllurnar verður mett at vera betri egnað,
- hvørt nevndin hevur lagt eina ítróttarliga, tekniska og tíðarætlanarliga meting av alternativu staðsetingini til grund, og
- hvørji ítøkilig krøv ella tillagingar nevndin metir kunnu gera umsøkta staðsetingina góðtakandi.

SST biður sostatt ikki um, at náttúruatlit verða sett til viks, men um at málið verður avgjørt á einum sakligum, upplýstum og samanberandi grundarlagi, har bæði náttúruatlit, ítróttarlig krøv, almenn frítíðarnýtsla, fólkaheilsa, kommunal ætlan og tíðarætlanin fram móti Oyggjaleikum verða tikin við í metingina.

Við vón um eina greiða og væl grundaða støðutakan.

Vinarliga

Sersambandið fyri súkkling og triathlon

Viðheft er oyggjaleikabreyt.